


Stephanssons Hús

# Næsta stig



**GOURMET**

## ATLANTIC PETROLEUM VERÐUR SKRÁSETT Á ICEX / VMF

***Mikudagin 15. juni 2005 verður Atlantic Petroleum, sum tað fyrsta føroyska partafelagið nakrantíð, skrásett á Íslendska Virðisbrævamarknaðinum (ICEX) í samstarvi við Virðisbrævamarknað Føroya (VMF).***

***Skráseting góðkend***

Nevndin í ICEX hevur tann 9. juni 2005 góðkent, at Atlantic Petroleum verður skrásett á íslendska virðisbrævamarknaðinum. Prospektið er tøkt á www.petroleum.fo, www.kaupthing.fo, www.kaupthing.net og www.kbbanki.is, og liggur frammi í KB bankanum hf, Kaupthing Virðisbrævameklarafelag Pf. og Atlantic Petroleum Pf.

***Fylg við partabrøvunum***

Hetta merkir í stuttum, at teir umleið 3000 føroysku og útlendsku partabrævaeigarnir í Atlantic Petroleum Pf. nú smidligari kunnu keypa og selja partabrøv, og ikki minst síggja hvat virði er á teimum. Allar fráboðanir verða kunngjørdar á heimasíðunum www.petroleum.fo og www.icex.is. Her kanst tú fylgja við prísgongdini á partabrøvunum og lesa øll tíðindaskrivini. Keyp og søla av partabrøvunum fer fram við at venda sær til Kaupthing Virðisbrævameklarafelag Pf. ella til føroysku peningastovnanar.

***Innbjóðing***

Í hesum sambandi verða partaeigarar felagsins og onnur áhugaði boðin til móttøku í nýggju matstovuni GOURMET - (fyrrverandi Kvøldlot) mikudagin tann 15. juni frá kl. 15.30 til 17.00.

Atlantic Petroleum